

## Kórsangur í Fuglafjarðar kirkju

Sunnudagin 27. apríl møtast kór í Eysturoynni í Fuglafjarðar kirkju, har kórkonsert verður kl 16:00 í kirkjuni. Kórini, ið fara at syngja, verða: Kirkjukórið í Fríðrikskirkjuni, kórleiðari Mikael J. Heinesen, Kór Glyvra kirkju, kórleiðari Meinhard Bjartalíð, Kórið hjá Jóhan, kórleiðari Jóhan Mortensen, Eystanljóð (Gøta/Leirvík), kórleiðari, Petur Martin Johannesen og Fuglafjarðar sangkór, kórleiðari Frits Johannesen. Einir 150 sangarar verða við í hesum átaki. Kórini syngja hvør sær og felags. Sungið verða vársangir, sálmar og klassisk løg við orgulfylgisspæli og trompet.

# Ynskja fleiri parkeringspláss

**- Hvussu ber tað til, at tað er so ómøguligt at fáa betri parkeringsviðurskifti í miðbýnum í Havn? Hendan spurningin seta handlarnir í miðbýnum í Havn nú Tórshavnar býráð. Í opnum brævi til býráðið ásanna handlarnir, at kommunan minkar um talið av parkeringsplássum til óbótaligan skaða fyri handilslívið**

FERÐSLA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Handlarnir vísa á, at kommunan hevur fríðkað um gongugøtuna, og tað fegnast teir um. Teir vísa eisini á, at ætlanir eru um at halda fram við hesum arbeiðinum.

- Hetta og viljin og áhugin fyri at fáa okkurt at henda í miðbýnum fegnast vit øll um. Men samstundis, sum tað ljóðar, at her skal henda meira í býnum, so verður eisini minkað um parkeringsplássini.

- Undir Bryggjubakka verður fríðkað, og tað ljóðar, at eingin parkering skal verða har longur. Fríðkanin av gongugøtuni minkaði um parkeringsplássini. Gaman í, ein gongugøta eigur helst ikki at vera ein parkeringsgøta, men eingi onnur pláss eru komin fyri tey mistu, siga handlarnir.

Teir vísa eisni á, at í Dr. Jakobsensgøtu, høvuðshandilsgøtan í miðbýnum, er ruðuleiki. Teir siga, at gøtan kundi verið gjørd til koyri-gongugøtu, har loyvt er at parkera stutta tíð.

- Sjálvt um vit ofta hoyra, at handlar verða niðurlagdir og flyta úr miðbýnum, halda vit, at talið á handlum og tænastum, sum verða veitt í miðbýnum er í vøkstri, og eigur at vaksa, tí miðbýurin er perlan í býnum. Tí má eisini vera pláss fyri øllum, so fólk hava møguleika at koma í býin.



*Handlarnir í miðbýnum í Havn siga, at uttan parkeringspláss – og harvið bilar í miðbýnum, doyr handilslívið*

Vit halda, at okkurt má gerast, og tað má gerast skjótt, siga handlarnir.

Á fundi, sum handlarnir í miðbýnum skipaðu fyri, greiddi býararkitekturin frá ætlanunum frameftir. Hann nevndi, at kommunan arbeiddi við at byggja parkeringshús og vísti á trý – fýra pláss, har slík hús kundu verða bygd. Handlarnir vísa á, at hetta er ein møguleiki at vaksa um parker-ingsmøguleikarnar, sum teir fegnast um, sjálvt um hetta eisini merkir parkeringsgjald. Annar møguleiki er parkometur, ið kunnu verða brúkt, har stytst er til handilsøkini. Hetta kundi t. d. eisini verið nýtt á pørtum av Skálatrøð.

- Vit fáa ein livandi bý, um miðbýurin ýður av fólki. Gera vit onki munagott nú, men skera her og har í parkeringsmøguleikunum, kunnu vit óttast, at miðbýurin spakuliga kvalist.

Uttan parkering ongar bilar, uttan bilar eingin fólk, uttan fólk nyttar einki! siga handlarnir.


# IT TAKES TWO

## - FYRILESTUR UM PARTERAPI

**Hugnakvøld í Miðlahúsinum**

Fyrilesturin gevur íblástur til eitt sunnari samskifti og tips um, hvussu vit kunnu tosa saman á ein jaligan hátt og hvussu vit betri hoyra, hvat makin í veruleikanum sigur...;-)

Kom til eitt hugnakvøld í Miðlahúsinum mánakvøldið 21. apríl kl. 20.00 og tak endiliga onkran við - makan, vinfólk, starvsfelagan, bindiklubban....

Fyrilestrarhaldarar eru Belinda Donkin og Birger Norup, sum ma. hava verið umrødd í blaðnum "Psykologi".

Kostnaður einans 100 kr. v/kaffi.
Tilmelding á www.synergi.fo





## Rak í 76 samdøgur á opnum havi

BJARGING

*Tíðindaskriv frá Shell*

Hóskvøldið 1. mai kl. 19.00, bjóðar Føroya Shell sínum skipakundum, til eitt serligt tiltak á Hotel Føroyum. Talan er um tvær spennandi frásagnir.

Í tøttum samstarvi við Trygdarmiðstøðina í Klaksvík, hevur tað eydnast Shell at fingið fatur á kenda amerikanska ævintýraranum og rithøvundanum Steven Callahan. Steven bleiv serliga kendur, tá seglskipið, sum hann sjálvur bygdi, forlisti við Kanarisku Oyggjarnar í 1982. Í lítlum bjargingarbáti rak hann í samfull 76 døgn tvørtur um Atlantshavið. Sjálvt um nógv skip sigldu fram við honum, so sá eingin bjargingarbátin. Steven royndi alt hvat hann kundi at yvirliva, og royndi hann at vinna á teimum kropsligu og sálarligu avbjóðingunum, sum hann var úti fyri. Hann navigeraði eftir stjørnunum, og yvirlivdi við teimum mest primitivu tólunum, sum hann sjálvur setti saman. Fleiri ferðir hesi 76 døgnini var hann við at geva skarvin yvir, men við einum áhaldandi treiskni og einum vilja av stáli, so megnaði hann at yvirliva.

Steven varð tikin upp av Caribiskum fiskimonnum 76 døgn eftir, at seglskipið forlistið uttan fyri Kanarisku oyggjarnar. Eftir hesa dramatisku hending, sum nógv varð at hoyra um hetta mundið, skrivaði Steven bøkurnar "Equippet to survive" og "76 days adrift". 76 days afrift var bestseljari hjá New Times í meira enn 36 vikur.

Hendingin sum Steven var úti fyri, gav honum eisini íblástur til at framleiða eitt nýtt model av bjargingarbáti. Hesin bátur, sum kallast The Calm, hevur hann fingið US patent uppá.

Umframt hendan spennandi fyrilestur, so fer Hans Eli Hansen úr Klaksvík, eisini at siga frá hendingini, sum sluppin Dart var úti fyri fyrst í 1900. Nakrir ungir norðoyingar fóru til Vestmanna eftir sluppini, men tá teir komu á Borðoyarnes, koma teir í ódnarveður – seglini skrædnaðu, og teir róku teir til havs. Í fleiri dagar royndu hesir ungu dreingir at lívbjarga sær, til teir ein dag sóu land í Hetlandi og fingu hjálp. Við samskiftinum sum tá var, hoyrdi eingin nakað til teir í Føroyum, fyrr enn góðan mánað eftir hendingina.

Tiltakið verður fyri allar skipakundar hjá Shell, og kunnu teir melda seg til hetta tiltak, við at ringja til 347412, ella við telduposti til shell@shell.fo . Avmarkað atgongd.